Hvalbiar Kommuna

Løgmansskrivstovan
Tinganes
Postboks 64
FO-110 Tórshavn

Hvalba, tann 14. nov. 2025
J.nr.: 102-49-2024/jbd

Hoyringsskriv um Suðuroyartunnilin frá Hvalbiar Kommunu:

Eingin ivi skal vera um, at Hvalbiar Kommuna metir tað vera alneyðugt at taka undir við verkætlanini Suðuroyartunnilin.

Demografiska gongdin í Suðuroynni hevur í nógv, nógv ár gingið tann skeiva vegin og er tað serliga álvarsamt, at okkara ungdómur fer av oynni fyri at fáa sær útbúgving, uttan at koma aftur, tí at størvini ikki eru her. Undirsjóvartunnilin hevði straks gjørt tað møguligt hjá okkara ungdómi at fest búgv í Suðuroynni og dagliga ferðast til arbeiðis á meginøkinum, har tann stóri arbeiðsmarknaðurin og størv til útbúgvin fólk eru.

Suðuroyggin hevur í nógv ár fingið meira og meira slagsíðu av skeiklandi gongdini og er tað í tøkum tíma, at fast samband verður millum Suðuroynna og meginlandið. Hvalbiar Kommuna kann ikki annað enn staðfesta, at Suðuroyartunnilin verður eitt stórt framstig fyri alla Suðuroynna.

Suðuroyartunnilin kemur at ávirka Hvalbiar sókn, tað er greitt. Tunnilin kemur upp í Sandvík, har nýggjur vegur skal gerast til nýggja tunnilin millum Sandvík og Hvalba. Í Hvalba skal eisini gerast nýggjur vegur, sum verður bundin í vegin til nýggja Hvalbiartunnilin.

Stórar vega- og tunnilsverkætlanir hava altíð ávirkan á náttúruna og nærumhvørvið, tað ásanna vit øll, eisini Hvalbiar Kommuna.

Tað er av týdningi, at vegaloysnirnar verða so væl frágingnar sum gjørligt, bæði tá talan er um staðseting av vegi í lendinum, ljóðtálman og atkomu til bæði eiðini, umframt økið vestantil í Sandvík. Tað er sera týdningarmikið, at vegaloysnir ikki gera seg inn á ella órógva grannaløg.

Bíarvegur 2 | FO-850 Hvalba | Føroyar

Tlf: (+298) 375033 | Fax: (+298)375385 | Teldupostur: hvalba@hvalba.fo | www.hvalba.fo

LM-066/2025

Hvalbiar Kommuna vil fegin frætta nærri um, hvussu vegaloysnirnar í Sandvík og í Hvalba ítøkiliga verða framdar. Kommunan vil vera ein virkin viðspælari til góðar loysnir og vil hava ein innkomuveg longur vesturi í bygdini, sóknini og fólkinum at frama.

Vinarliga
Hvalbiar Kommuna

Janus Thomsen
borgarstjóri